# Føroyar lesa

NÁM

## Læraradagur í Norðurlandahúsinum 8.-10. november 2022

Skrá:

**Kl. 8:00** Innskriving og morgunmatur

**Kl. 9:00** Vælkoma

**Kl. 9:30** **Felags fyrilestur 1**

**Kannandi bókmentaundirvísing** Thomas Illum Hansen (DK), ph.d., granskingarstjóri á UCL Erhvervsakademi og Professionshøjskole

Í fyrilestrinum kemur Thomas Illum Hansen inn á lyklahugtøk, sum eru grundfest í kannandi frálærufrøðini í bókmentum. Heldur enn at leggja orkuna í at arbeiða við lesisnildum verður dentur lagdur á tulkingarsnildir. Kannandi tilgongdin til arbeiðið við fagurfrøðiligum tekstum gevur lærarum og næmingum eitt felags mál og nýggjar møguleikar, sum rúma øðrvísi sjónarringum, fremmandum frásjónum og avbjóðandi listasniðum.

**Kl.10:15** Kaffisteðgur

**Kl.10:45** **Felags fyrilestur 2**

**Kvalitativa lesivanakanningin**
Lydia Didriksen, námslektari
Turið Kjølbro, ritstjóri
Sissal Rasmussen, ph.d., adjunktur

Í 2018 var stór kanning av lesivanum hjá føroyskum børnum gjørd. Aftan á kanningina gjørdi lesikanningarbólkurin uppskot um átøk at fremja lesihugin. Eitt av uppskotunum var at gera eina kvalitativa kanning av lesivanum í 6. flokkunum kring landið. Endamálið við hesi kanningini var at fara aftur um summi úrslit, ið komu fram í lesivanakanningini, og at lýsa hesi nærri. Í hesi kvalitativu kanningini, sum nú verður løgd fram, verður ljós varpað á tey nýggju úrslitini, har børnini lýsa sín lesihugburð og sínar lesivanar.

**Kl. 11:30** Døgurðasteðgur

**Kl.12:30**

| Verkstova 1: | Verkstova 2: | Verkstova 3: | Verkstova 4: | Verkstova 5: |
|---|---|---|---|---|
| **PISA – lesivanar**<br>Asta Wolles, ráðgevi í føroyskum | **Máltøka**<br>Sissal Rasmussen, ph.d., adjunktur | **"Kom og les"**<br>Pálin Olsen, lesivegleiðari og lærari | **Relatiónir og munadygg menning**<br>Andrew av Fløtum og Páll M. Joensen, lærarar | **Støddfrøðiligt lesføri**<br>Ingi Højsted, ph.d., adjunktur |
| Í PISA-kanningunum í 2009 og í 2018 var høvuðsøkið lesiførleiki. Eykatilfarið um bakstøðið hjá næmingunum legði dent á lesing og lesivanarnar hjá næmingunum. Summir av hesum spurningunum og svarunum verða løgd fram, og tosað verður um, hvørjar ábendingar vísa seg í svarunum. | Áhugin fyri máltøku hjá børnum er vaksin nógv tey seinnu árini, og tað kemst serliga av, at gransking vísir tætt samband millum málsligu menningina, og hvussu væl børnini seinni duga at lesa. Fyrilesturin um máltøku tekur støði í føroyskum dátum, og serligur dentur verður lagdur á orðfeingi og týdningin, sum orðfeingi hevur fyri lesiførleikar. | Í verkstovuni verður greitt frá tilfarinum og skeiðnum, sum er partur av "Kom og les"-átakinum. Átakið hevur til endamáls at styrkja lesing, og tilfarið kann brúkast til at menna lesingina hjá næmingunum í 3. – 6. flokki.<br><br>"Kom og les" er samstarv millum Føroyar lesa og Lesivegleiðarafelagið. | Í verkstovuni verður greitt frá, hvussu arbeitt verður við at fáa næmingar á Skúlanum á Trøðni at fóta sær í skúlahøpi. Námsfrøðiliga grundarlagið byggir á góðar, sunnar og nærverandi relatiónir, so næmingarnir hvønn dag uppliva at læra og trívast persónliga og saman við øðrum. | Seinastu 20 árini hevur hugtakið støddfrøðiligt lesføri (litterasi) vunnið seg fram í undirvísingarheiminum. Úrslit frá PISAkanningum hava elvt til nógvar broytingar í undirvísingarverkunum í fleiri londum. Men hvat merkir støddfrøðiligt lesføri? Hvør er upprunin til hugtakið? Og hvussu samsvarar hetta við støddfrøði sum lærugrein í Føroyum? Spurningar sum hesir verða viðgjørdir í verkstovuni. |

**Kl.13:15** Kaffisteðgur

**Kl.13:45** **Felags fyrilestur 3**

**Kritiskt lesføri**
Marthe Øidvin Burgess (NO), lektari í norskum Universitetet Sørøst-Norge

Kritiskt lesføri kann lýsast sum eitt øki í undirvísing og gransking við tveimum aðaltáttum. Annar snýr seg um at menna røddina hjá næmingunum. Hin snýr seg meira ítøkiliga um at menna málsligu og tekstligu førleikarnar hjá næmingunum.
Hesir báðir tættirnir eru støðið undir granskingarverkætlanini CritLit, sum hevur trý høvuðsmál: 1) at kortleggja núverandi undirvísingarvanar, 2) at menna námsfrøðiligar leistar og læriamboð, og 3) at menna og breiða út granskingargrundaða vitan um kritiskt lesføri í fólkaskúla, á miðnámi og í læraraútbúgvingini.
Í fyrilestrinum verður kunnað um verkætlanina, ymisk háttaløg, fyribils úrslit og dømi.

**Kl.14:30** **Undirhald**

**Kl.14:50** **Samanumtøka**